# Slóðbrótandi klænkitilboð

**Venjingarmiðstøðin Yndi í Havn bjóðar nú fólki, ið hava tørv á at sleppa av við nøkur kilo, eina heilt nýggja klænkiætlan, ið fevnir um bæði venjing, kost og persónliga ráðgeving**

KLÆNKING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í hesum døgum eru tað ivaleyst mong, ið hava ætlanir um at sleppa av við nøkur kilo eftir jólini, og hjá summum er tørvurin størri enn hjá øðrum. Venjingarmiðstøðin Yndi fer í næstum undir at bjóða teimum, sum skulu av við nokk so fitt av kiloum, eitt skeið, har tey við hjálp av ráðgeving frá bæði kropsligum venjarum, kostráðgevum og øðrum serfrøðingum fáa gjørt eitt persónligt skeið, ið skal hjálpa tey av við tey óneyðugu kiloini.



## Nýskapandi heildarloysn

Jákup Jacobsen frá Yndi sigur, at talan er um nýhugsan innan klænkiskeið í Føroyum, og hann veit ikki um, at slík skeið eru aðrastaðnis.

– Talan er um eina heildarloysn. Tá ið tú hevur meldað teg til skeiðið, kemur tú til eina samrøðu við kropsligar venjarar, kostráðgevar og onnur, sum saman við tær gera eina ætlan fyri skeiðið, sigur Jákup Jacobsen.

*Í Yndi hava tey gjørt klárt til luttakararnar á nýggja klænkiskeiðnum, og øll hugsandi útgerð er útvegað, ið kann hjálpa fólki at sleppa av við tey óneyðugu kiloini.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hann sigur, at talan ikki er um nakran »mirakelkur«, tí talan er um eina lívsstílsbroyting, ið krevur hart arbeiði av tí einstaka luttakaranum.

– Tað er eisini umráðandi fyri okkum, at tann einstaki luttakarin sær eina meining í tí, sum hann ger á skeiðnum, sigur Jákup Jacobsen.

## Persónligt máltíð til dyrnar

Ein týðandi partur av einum slíkum klænkiskeiði er sjálvsagt kosturin, og tað er ikki altíð so lætt hjá einum persóni, ið vil sleppa av við nøkur kilo, at standa og gera vanligan mat til familjuna, samstundis sum man ger eitt klænkimáltíð til sín sjálvs.

– Vit fara at bjóða teimum, sum eru við á skeiðnum, at tey kunnu bíleggja máltíð frá okkum. Talan er um máltíð, bæði døgurða og náttúrða, ið eru gjørd út frá tí einstaka skeiðsluttakaranum. Máltíðini verða gjørd í einum góðkendum stórkøki og hava fyrstaflokks góðsku, sigur Jákup Jacobsen.

Nógv av teimum, sum viga eitt sindur ov nógv, hava mangan eisini ilt við at fara og venja saman við øðrum, sum kropsliga eru betur fyri enn tey, og henda trupulleika ætlar Yndi sær eisini at loysa.

– Vit fara hvønn týs-, hós- og leygarmorgun at hava tveir tímar, har tað bert er atgongd fyri hyldligum fólkum í Yndi. Hetta fer vónandi at eggja fleiri slíkum at koma og venja, sigur Jákup Jacobsen. Hann leggur afturat, at leygarmorgun verður ein kostráðgevi eisini fast í hølunum hjá Yndi, so at tey, sum eru við á klænkiskeiðnum, kunnu fáa ráðgeving og tosa um, hvussu tað gongur við at klænka seg.

## Bert fyri fólk við nógvari yvirvekt

Nýggja klænkitilboðið, sum hevur fingið heitið KGB, ið stendur fyri Komið & Gerið Broytingar, fevnir um eitt skeið upp á 10 vikur. Kostnaðurin fyri skeiðið er 2.400 krónur, og tá er óavmarkað atgongd til venjingarhentleikarnar í Yndi íroknað. Øll ráðgeving er eisini íroknað, men um tú vilt hava klænkimáltíð til dyrnar, noyðist tú at gjalda eyka fyri hetta. Jákup Jacobsen sigur, at skal skeiðið gerast veruleiki, er neyðugt við í minsta lagi 20 luttakarum, men tað ivast hann ikki í fer at eydnast.

Kunnandi fundur um nýggja klænkitilboðið verður í Yndi komandi leygardag frá klokkan tólv til eitt.



*Kropslig venjing er sjálvsagt ein ógvuliga týðandi partur av skeiðnum, sum byrjar í næstum.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*




Føroyaprent fer nú at menna marknaðar- og søluarbeiðið, og søkja vit tí eftir søluleiðara. Tú skalt, saman við tilboðsroknarum og virkissamskipara, styrkja tey trý grundleggjandi virðini hjá okkum, sum eru: rættur prísur, góðska og levering til tíðina.

**Vit hugsa okkum, at tú:**
- helst hevur eina viðkomandi útbúgving innan sølu og marknaðarføring
- hevur royndir við B2B sølu
- hevur lætt við at samskifta við viðskiftafólk og starvsfelagar
- dugir at orða teg í talu og á skrift
- hevur lætt við at koma í samband við fólk
- hevur áræði, ert álítandi, nærlagdur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- at títt fremsta mál er at fáa kundarnar at kenna seg nøgdar

**Ábyrgdarøki**
Sum søluleiðari hevur tú ábyrgd av allari sølu og marknaðarføring, tað verður tín uppgáva at styrka sambandið við viðskiftafólk okkara, eins og tú skapar samband við nýggjar kundar.
Fram um alt skalt tú virka undir tí grundleggjandi treytini: Eitt orð er eitt orð.

**Arbeiðsviðurskifti**
Á Føroyaprent bjóða vit tær eitt mennandi umhvørvi. Tú fært eitt avbjóðandi starv, sum er at menna størsta grafiska virkið í Føroyum. Málið er sjálvandi ein sunnur øktur umsetningur. Tú fert at virka undir stjóranum og í okkara leiðslubólki
Løn sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Vilt tú vita meira, so ring til Jon Hestoy, stjóra, á telefon 59 45 55.

**Umsóknarfreist 22. januar 2006**

Skrivlig umsókn við CV verður at senda til:
Pf. Føroyaprent
att.: Jon Hestoy
Postsmoga 3118 - 110 Tórshavn

Hoyviksvegur 59 · Postsmoga 3118 · 110 Tórshavn
Tel. 31 45 55 · fax 31 80 26 · hestoy@foroyaprent.fo

Føroyaprent